TANNARØKTARI

Kommunala barnatannarøktin á Tvøroyri søkir eftir tannarøktar at byrja 1. februar 2007. Tannarøktin umfatar børnini í Suðuroyar norðaru helvt frá 0-16 ár.

Starvið
Tannarøktarin skal gera fyribyrgjandi viðgerðir á tannlæknastovuni, og taka sær av upplýsandi/fyribyrgjandi arbeiði á skúlum og dagstovnum.

Faklig førleikakrøv
Útbúgving sum tannarøktari.
Fyrimunur at hava royndir frá kommunalari tannarøkt og fyribyrgjandi arbeiði.

Persónlig førleikakrøv
- Hava lætt við at tosa við børn og foreldur.
- Hava hug til at arbeiða við børnum.
- Duga væl at samstarva.
- Vera sjálvstøðugur í sínum arbeiði.

Løn og setanartreytir
Løn sambært avvarandi yrkisfelag og kommununa. Starvið er eitt nýupprættað hálvtíðarstarv við eini royndartíð uppá eitt ½ ár , orsakað av hølisviðurskiftunum.

Gjøllari upplýsingar um starvið
Kunnu seta seg í samband við Rutt Jensen klinikkstjóra tlf. 371216.

Umsóknir
Umsóknir við prógvum, CV og møguligum viðmælum, skulu vera Barnatannarøktini í hendi í seinasta lagi 19. jan. 2007.

Umsóknin skal sendast til:
Kommunala Barnatannarøktin
800 Tvøroyri

TVØROYRAR KOMMUNA

Kunngerð frá Matrikulstovuni

Matrikulstovan letur upp mánadagin 8. januar á Traðagøtu 38, Argir.

MATRIKULSTOVAN 1948

Postadressan er:
Postboks 2048
165 Argir

Grundstykki til sølu

Um hóskandi boð fæst, er eitt grundstykki uppá 454 fermetrar til sølu við Rættargøtu í Klaksvík.

Nærri fæst at vita á tlf: 216456

FØROYA HANDILSSKÚLI

TEAM85

Lærarar til FHS

Søkt verður eftir lærara ella lærarum til hesar tímar í Tórshavn:

Samfelagslæru/Fiskivinnu C	(6 t/v)	á dagskúlanum
Marknaðarførslu C	(8 t/v)	á dagskúlanum
Marknaðarførslu C	(3 t/v)	á kvøldskúlanum

Starvið er tíðaravmarkað frá 29. januar til 27. juni 2007.

Løn:
Lærarar verða løntir eftir sáttmála millum Lærarafelag Handilsskúlans og Fíggjarmálaráðið.

Umsókn:
Umsóknin skal stílast til Føroya Handilsskúla og sendast til Føroya Handilsskúla, Marknagilsvegur 77, Postsmoga 177, 110 Tórshavn.
Umsóknirnar skulu vera skúlanum í hendi í seinasta lagi 19. januar 2007.
Umsóknarblað fæst á skúlanum ella á heimasíðu skúlans www.fh.fo.

Nærri upplýsingar kunnu fáast við at venda sær til Olav Absalonsen ella Sonju Oyrabø Petersen á telefon 317177, teldupostur: oa@hsh.fo ella sp@hsh.fo.

FØROYA HANDILSSKÚLI
Postsmoga 177 · 110 Tórshavn · Tel 317177 · Telefax 313374
Heimasíða skúlans: www.fh.fo

Býr ein verkførari í tær?

P/F Ivan Johansen Bilar søkir eftir búnum lærlingi M/K til verkføraraskrivstovuna.

Sum lærlingur á verkføraraskrivstovuni ert tú ein týðandi partur av virksemi felagsins, av tí at tú í felag við verkføraran hevur ábyrgdina av samskiftinum við viðskiftafólk okkara eftir bilakeypið.

Uppgávurnar fevna m.a. um:
- Móttøka
- Innskriving
- Fakturering
- Annað fyrifallandi arbeiði

Tekniskur kunnleiki til bilar er ikki neyðugur, men tó ein fyrimunur.
Neyðugt er, at tú ert virkisfús/ur, álítandi og leggur dent á kundatænastu.
Løn eftir avtalu.

Send eina umsókn ella teldupost **innan 1. februar 2007** til:
P/F Ivan Johansen Bilar • Postbox 3205 • Hoyvíksvegur 63 • FO-110 Tórshavn • ivan@ivan.fo

P/F Ivan Johansen Bilar er einasta ISO góðkenda bilasøla í Føroyum. Felagið bleiv stovnað í 1971 og hevur støðugt ment seg til at verða ein av størstu bilasølum í landinum. 23 fólk starvast hjá P/F Ivan Johansen Bilum, og felagið umboðar Mercedes-Benz, Citroën, Mitsubishi, Chrysler, Jeep og Dodge.

CHRYSLER Jeep CITROËN

Ivan Johansen Bilar

Hoyvíksvegur 63 · Postboks 3205 · 110 Tórshavn · tel 31 36 66 · ivan@ivan.fo · www.ivan.fo